## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og regn av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi, seinnapartin skrið ella stormur av suðri. Stundum regn og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Skrið ella stormur av suðri og stundum regn. Hitin millum 8 og 11 atig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Sunnudagin minkar hann vindin niður í stívt andøvsgul av útsynningi, mánadagin stívt andøvsgul av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 4 og 8 stig.

# 10 ára gamla Martina úr Milano bønar um pennavinir

**Ein 10 ára gomul genta úr Milano hevur tikið eitt heldur óvanligt stig, fyri at koma í samband við føroyskar pennavinir. Hetta er hennara søga**

**BRÆV**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nú ein dagin lá eitt bræv, stemplað úr Italiu, í postboksini hjá SamVit – sum nú liggur undir Uttanríkisráðnum. Ikki tí, einki óvanligt er í tí, at SamVit fær brøv úr londum bæði nær og fjar.

Men hetta var ikki eitt vanligt bræv, skrivað við teldu, stemplað, daterað, fult av tølum ella torskildum enskum spurningum og við talgildari undirskrift.

Í lítla brúna brævbjálvanum – sum er av tí minstu støddini av brævbjálvum – liggja tvey vanlig A4 ark, bukkaði tvær ferðir, so tey passa niður í tann lítla brævbjálvan. Eisini liggja fýra postkort við myndum úr Toscana.

Tað er longu nú týðuligt, at hesin avsendarin hevur onnur ørindi enn formelt samskifti og ferðavinnu ella eitthvørt annað.

Tá tú letur pappírini upp sær tú, at á øðrum pappírinum stendur hondskrivaður tekstur, týðiliga merktur av, at tann, ið førir pennin, er nýggjur í yrkinum. Men tað er týðuligt at lesa hóast alt, og á greiðum enskum máli.

Á hinum pappírinun er ein tekning av fjøllum við hvítum tindum, grasi og einum seyði.

### Vil hava føroyskar pennavinir

Niðast á hondskrivaða arkinum stendur avsendarin skrivaður. Talan er um eina 10 ára gamla gentu úr Milano, sum eitur Martina Faedda.

Hon skrivar, at hon hevur sæð eina dokumentar í sjónvarpinum um okkara oyggjar, og at hon beinanvegin fann útav, at hon elskar tær. Hon sigur, at »útsýnið er gandakent og har eru nógvir seyðir, og tað er mítt yndisdjór«.

Martina sigur, at hon ynskir at fáa føroyskar pennavinir, gentur ella dreingir. At senda eitt bræv so langan veg, má kallast ein megnaravrik, og tí lata vit her hennara adressu víðari, so vónandi onkur svarar hennara umbøn.

Um tú hevur hug at skriva Martinu Faedda eitt bræv, so send til Martina Faedda, Via Venini 141A, 20127 Milano, Italia.



*Hesa fittu myndina hevur 10 ára gamla Martina Faedda úr Milano teknað og sent saman við brævinum. Hon ynskir at fáa føroyskar pennavinir*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 0 |
| London | -1 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -6 |
| Keypmannah. | -4 |
| Helsinki | -17 |
| Moskva | -7 |
| Berlin | -5 |
| Warzawa | -5 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | -4 |
| Madrid | 1 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 17 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | -7 |
| New Dehli | 10 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 25 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 9 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt djúpt lágtrýst, 969 hPa. Sunnan fyri Ísland fer í útnyrðing.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer vestureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar komandi samdøgur.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 07/01 kl. 06⁰⁰ – 08/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: -0,6°
Minsti hiti máldur í januar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í januar: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/01 kl. 06⁰⁰ – 04/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í januar: 10 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

1. januar: Mánin næstur jørðini
3. januar: Jørðin næst sólini
7. januar: Seinna kvarter
15. januar: Tendring
17. januar: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 13. jan | 05:09 | 17:34 | 04:09 | 16:34 | 04:24 | 16:49 | 07:09 | 19:34 | 08:09 | 20:34 | 03:24 | 15:49 | 02:24 | 14:49 | 05:24 | 17:49 | 06:24 | 18:49 | 04:54 | 17:19 | 06:09 | 18:34 |
| 14. jan | 05:58 | 18:22 | 04:58 | 17:22 | 05:13 | 17:37 | 07:58 | 20:22 | 08:58 | 21:22 | 04:13 | 16:37 | 03:13 | 15:37 | 06:13 | 18:37 | 07:13 | 19:37 | 05:43 | 18:07 | 06:58 | 19:22 |
| 15. jan | 06:45 | 19:09 | 05:45 | 18:09 | 06:00 | 18:24 | 08:45 | 21:09 | 09:45 | 22:09 | 05:00 | 17:24 | 04:00 | 16:24 | 07:00 | 19:24 | 08:00 | 20:24 | 06:30 | 18:54 | 07:45 | 20:09 |
| 16. jan | 07:29 | 19:50 | 06:29 | 18:50 | 06:44 | 19:05 | 09:29 | 21:50 | 10:29 | 22:50 | 05:44 | 18:05 | 04:44 | 17:05 | 07:44 | 20:05 | 08:44 | 21:05 | 07:14 | 19:35 | 08:29 | 20:50 |
| 17. jan | 08:10 | 20:30 | 07:10 | 19:30 | 07:25 | 19:45 | 10:10 | 22:30 | 11:10 | 23:30 | 06:25 | 18:45 | 05:25 | 17:45 | 08:25 | 20:45 | 09:25 | 21:45 | 07:55 | 20:15 | 09:10 | 21:30 |



Forelskað?
Vís tað í Sosialinum

Javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo